# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Bjarni í Sjúrðagarði farin

Sunnudagin bórust deyðsboðini av Bjarna í Sjúrðagarði, lærara, Kaldbak, sum síðani tíðliga í ár hevur drigist við herviliga sjúku. Bjarni, sum var 41 ára gamal, var úr Havn, sonur Astrid og John í Sjúrðagarði. Hann vaks upp úti í Grønlandi í Havn, í Sløttulíð, og gekk øll barnaárini í Venjingarskúlanum. Teir vóru tveir brøður, Óli Hans, sum er 44 ára gamal, sum er kiropraktor og býr í Svøríki.

Mamman Astrid, f. Nolsøe, er ættað úr Vági, og pápin, John, f. Gaard, er úr Havn.

Bjarni var giftur við Kirstin Ellingsgaard úr Sørvági, sum er dóttir Henzar og Ingu Ellingsgaard. Bjarni gekk í trý ár á N. Zahles Seminarium í Keypmannahavn og tók lærarapróg v á Føroya Læraraskúla í 1993.



Hann hevur verið lærari á Dímun frá 1993-95, í Kaldbak oktober-desember í 1995, í Eysturskúlanum janaur-juli í 1996 og síðani 1996 í Tórshavnar Kommunuskúla. Hann hevur verið á ymsum stuttum skeiðum, serliga í støddfrøði og lívfrøði.

Við síðuna av lærarastarvinum læs Bjarni eisini sálarfrøði, og tók hann í 2004 prógv frá Danmarks Pædagogiske Universitet sum Cand.pæd. psych. Hann starvaðist eisini sum parttíðar sálarfrøðingur hjá Ríkisumboðnum í Havn.

Eftir Bjarna sita børnini: Teitur, Guðrið og Tinni, sum bert er eitt ára gamal.

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Olina Niclassen, ættað av Velbastað**, andaðist leygardagin 9. desember, 83 ára gomul. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin klokkan 17.00. Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar Kirkju mikudagin klokkan 14.00.

**Bjarni í Sjúrðagarði, Kaldbak** andaðist 10. desember á Landssjúkrshúsinum, 41 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

# »Norske Løve« fær góð ummæli




*»Norske Løve – stolt skib, krank skæbne« er ein áhugaverd bók og enn ein brikkur í føroyskari søgu og í danskari sjófarts- og hjálandasøgu*



*Bjarni Åkesson Filholm hevur skrivað bókina »Norske Løve«*

**Søgan um Norsku Løvu er áhugaverd fyri bæði føroyingar og danir. Síðan bókin »Norske Løve« hjá dansk/føroyska rithøvundanum Bjarna Åkesson Filholm, kom út, hevur hon fingið góð ummæli í donsku fjølmiðlunum**

BÓKAUMMÆLI

Bókin sigur frá um danska handilsskipið »Norske Løve«, ið fór úr Keypmannahavn í 1707 og um dramatisku ferðina, sum endaði við skipbroti á Lambavík. Um tað spennandi og torgreiddu bjargingina av manning og farmi og um sjóforhoyrið, sum var í Havn.

Lektør: Hans Michelsen skrivar m.a. »Filholm belyser sit emne fra mange sider, og han skriver en spændende historie -han har fat i en stor historie«.

»Nordjyske« skrivar: »Norske Løve falder i tråd med de fleste af Bjarni Åkesson Filholms bøger. Hann har nemlig en vis forkærlighed for at skrive om skibe«.

Blaðið Søfarten og Danmark« skrivar: "Bogen er nok en beretning om forliset, men den er også et tidsbillede af forholdene i Danmark og på Færøerne for 300 år siden. Den viser også at der var faste, formaliserede regler indenfor søfart og ikke mindst i forbindelse med forlis«.

Skipið var lastað við gulli til at keypa kryddurtir og aðrar vørur fyri í Trankebar. Men so langt kom skipið ongantíð.

Rithøvundurin hevur roynt at kanna hvat er at finna av lutum frá Norske Løve í dag. Millum lutirnar frá skipinum er ein klokka í Havnar kirkju frá skipinum, men hvar sjálvt vrakið av skipinum er, er enn ein gáta.

Tað er »Forlaget Nautilus« sum gevur bókina út. »Norske Løve« er 136 blaðsíður og fæst í bókabúðunum.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri samkenslu, tá kæra kona mín, mamma, omma, systir, vermóður og langomma okkara

**Fanny Reinert Djurhuus**
Innan Glyvur
fødd Petersen, úr Saltnesi

so brádliga varð tikin frá okkum.
Takk fyri allan kærleika á ymiskan hátt.
Takk fyri ta hjálp, sum veitt varð okkum í sambandi við jarðarferðina.
Takk fyri blómur og kransar og peningagávu til Sjóvar kirkju. Takk fyri vitjan, telefonuppringingar, heilsanir og minningarorð.
Takk, Jógvan Fríðiksson, fyri lívgandi vitjanir og hjálp og tey fjálgandi orðini í kapellinum. Stóra tøkk øll tit, ið tóku tykkum av ervinum. Tøkk til sangarar og kirkjutænarar.
Takk Jógvan Fríðriksson og N. P. Danielsen fyri vøkur orð í kirkjuni, og øllum tykkum mongu, ið fylgdu henni til hennara síðsta hvíldarstað her á jørð.
Stóra tøkk til tykkum, ið gjørdu tað møguligt, at tey, ið ikki sluppu inn í kirkjuna, kundu verða undir taki í bussum og øðrum hølum, og hoyra tað, ið sagt varð í kirkjuni.
Gleðilig jól og eitt av Harranum signað nýggjár.

**Oluf og børn við familjum**